planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

## Kokkurin mist 100.000 krónur

Kokkurin Hans Jacob M. Garðalíð, ið stóð fyri øllum matinum til tónleikarar og arbeiðsfólk við Múrin, er nú farin til sakførara, tí hann hevur mist yvir 100.000 krónur, og hevur enn einki fingið frá festivalinum við Múrin.

- Eg ætli mær at koyra teir konkurs, sigur Hans J. Garðalíð.

Nú hevur Múramálið tikið enn eina vending, tá ið kokkurin Hans Jacob M. Garalíð í dag hevur vent sær til ein sakførara, við vón um at fáa sín pening afturgoldnan. Hann hevði mat til allar tónleikarar og arbeiðsfólk um hendið, og hevur nýtt yvir 100.000 krónur úr egnum lumma til festivalin við Múrin. Enn hevur hann einki móttikið frá festivalinum við Múrin, og tí hevur hann í dag vent sær til ein sakførarar, ið skal hjálpa honum í málinum.

- Eg fari í dag at ráðføra meg við mín sakførarar, um hvat eg skal gera í málinum, men onkursvegna skal eg so hava mínar pengar, sigur Hans Jacob M. Garðalíð.

**Teir offra meg**

Hans Jacob M. Garðalíð kennir seg ógvuliga vónbrotnan av málinum, og sigur seg ikki hava aðrar møguleikar í løtuni enn at stevna.

- Hasir menninir offra tey fólkini, sum kunnu offrast í múrakonseptinum, meðan tey, ið ikki kunnu offrast burtur, fáa sína løn, sigur hann.

Hans Jacob M. Garðalíð fer í dag at taka støðu til, hvussu hann skal fara víðari í málinum, men hann hevur í øllum førum ætlanir um, at fáa sín pening afturgoldnan.

- Teir hava sjarmera meg til at arbeiða fyri seg, hóast teir eftir øllum at døma aldrin hava havt ætlanir um at rinda mær mína løn. Eg og mín fyritøka yvirliva ikki, um eg ikki fái mínar pengar aftur, sigur hann.

Sostatt er greitt, at tónleikarar og arbeiðsfólk av ymsum slag hava í dag vent sær til sakførarar við vónini um, at fáa tað teimum er lovað.

# Tónleikarar sláa saman móti Múr



**Nú hava tónleikarar eftir øllum at døma fingið nóg mikið av brotnum lyftum frá Múrinum. Í dag gera tónleikararnir greitt, at nú gongur leiðin til ein felags sakførara**

Enn einaferð hava fyrireikararnir við Múrin útsett lønardagin hjá tónleikarunum. Fyrireikarar lovaðu fyri stuttum, at lønin í seinasta lagið bleiv útgoldin 1. September, men enn er eingin løn at heinta, og tónleikararnir hava fingið boð um, at tað framvegis verður arbeitt við at fáa fígging til vega, soleiðis at lønin kann gjaldast fyri tær nógvu framførslurnar við Múrin.

Men nú hava tónleikararnir eftir øllum at døma fingið nóg mikið av brotnum lyftum.

Fleiri av tónleikarunum, sum framførdu við Múrin, hava nú tikið stig til at fáa ein sakførara uppí leikin, ið skal umboð allar teir føroysku tónleikararnir, ið framvegis vanta samsýning.

- Fleiri tónleikarar hava tikið stig til at fáa ein felagssakførara uppí leikin, og vit ætla okkum eisini at koyra málið til innkrevjingar, sigur Niels Uni Dam, forsangarin í Mc-Hár. Hann sigur, at tað ikki eru limirnir í Mc-Hár, sum hava tikið stig til at fáa sakførara uppí leikin, men at teir hava ætlanir um at sláa seg saman við hinum tónleikarunum.

**Sannleikin hevði sigrað**

Tað víðagitna Múramálið hevur tikið nógvar ymiskar vendingar síðani tað av fyrsta sinni bleiv varpað ljós á vantandi samsýningar, og enn er seinasta orðið neyvan sagt. Men málið hevði sambært tónleikarunum ikki verið eins óheppi, um sannleikin kom fram frá byrjanini.

- Mær dámar ikki, tá ið fólk lúgva fyri mær, ella tá ið tað verður logið uppá meg. Og fyrireikararnir við Múrin hava bæði logið fyri mær, og uppá meg í hesum málinum, sigur Niels Uni Dam, forsangari í Mc-Hár.

Mark Joensen, fyrireikari, hevur sambært Niels Una Dam sagt eitt við tónleikararnir, meðan hann hevur sagt eitt annað við fjølmiðlarnir.

- Hetta málið hevði als ikki verið eins óheppi og keðiligt, um sannleikin bara varð sagdur frá fyrstan tíð. Tað er keðiligt, at vit hava fingið at vitað, at fíggingin er funnin, tá ið tað nú er greitt, at eingin fígging er, sigur Niels Uni Dam.

Enn hava tónleikararnir ikki vent sær til ein sakførarar, men sum skilst verður ein felags sakførari funnin í vikuni, sum síðani skal umboða tónleikararnir í Múramálinum.

